Hósdagur 28. desember

SVF

18.30 Teknifilmar
19.00 Børnini í Nýggjaskógi 5:6 – bretsk familjurað
19.30 Tá feittið skal burtur – um venjingar og motión
20.00 Dagur og Vika
20.20 Eitt óvanliga vanligt brúdleyp – ensk dokumentar
21.10 Hotellið 3 – donsk dramarað
21.55 Roomservice – íbúðin verður broytt
22.25 Kaldar føtur – seinasti partur
23.15 Frank Sinatra – tey allarbestu árini
00.40 Liðugt

EUROSPORT

07:30 Xtreme sports
08:30 Cycling
10:00 Olympic games
10:30 Luge
11:00 Live alpine skiing
12:30 Athletics
15:00 Football
16:00 Alpine skiing
17:00 News
17:10 Ski jumping
18:30 Motorsports
18:45 Motorcycling
19:15 Motorsports
19:30 Rally
20:00 Motorsports
20:15 Formula 3000
20:45 Motorsports
21:00 Football
22:00 News
22:10 Alpine skiing
23:00 Sumo
00:00 Strongest man
01:00 Close

BBC PRIME

0.15 TLZ: »Watergate – Brek in«
1.05 TLZ: »Horizon – The Genius of the Jet«
2.00 Macbeth
4.30 TLZ: »Shakespeare on the Estate«
5.30 TLZ: »Follow through«
6.00 The Further Adventures of Superted: »Sheepless Knights«
6.30 Playdays
6.50 The Animal Magic Show: »Olympics«
7.05 The really Wild Show
7.30 Ready Steady Cook
8.00 Style Challenge
8.25 Change that: »Harrogate«
8.50 Going for a Song
9.30 Top of the Pops
10.00 Battersea Dogs Home
10.30 TLZ: »Horizon – Clous Encounters«
11.30 Looking Good
12.00 Ready Steady Cook
12.30 Style Challenge
13.00 Doctors
13.30 EastEnders
14.00 Change that: »Harrogate«
14.25 Going for a Song
15.00 The Further Adventures of Superted: »Sheepless Knights«
15.30 Playdays
15.50 The Animal Magic Show: »Olympics«
16.05 The really Wild Show
16.30 Top of the Pops
17.00 Home Front
17.30 Doctors
18.00 EastEnders Omnibus6
18.30 Molly's Zoo at Christmas
19.00 Fawlty Towers: »The Builders«
19.30 Chef
20.00 Casualty
21.00 Harry Enfield and Chums: »Harry Enfield and Christmas Chums«
21.40 Top of the Pops
22.10 Jonathan Creek: »Black Canary«
23.40 Dr. Who: »The Visitation«

BBC WORLD

00.00 News – Weather
00.30 HARDtalk
01.00 News – Weather
01.30 Holiday
02.00 News – Weather
02.30 World Review – Beyond 2000: »Europe Asylum Seekers«
03.00 News – Weather
03.30 Asia Today
03.45 World Business Report
04.00 News – Weather
04.30 HARDtalk
05.00 News – Weather
05.30 Top Gear
06.00 News – Weather
06.30 World Review – Beyond 2000: »Europe Asylum Seekers«
07.00 News – Weather
07.30 HARDtalk
08.00 News – Weather
08.30 World Review – Beyond 2000
09.00 News – Weather
09.30 HARDtalk
10.00 News – Weather
10.30 Holiday
11.00 News – Weather
11.30 World Review – Beyond 2000
12.00 News – Weather
12.30 HARDtalk
13.00 News
13.15 World Business Report – Weather
13.30 Top Gear
14.00 News – Weather
14.30 World Review – Beyond 2000
15.00 News – Weather
15.30 Asia Today
16.00 News – Weather
16.30 HARDtalk
17.00 News
17.15 World Business Report – Weather
17.30 Talking Movies Special
18.00 News – Weather
18.30 World Business Report
18.45 World Sport
19.00 News – Weather
19.30 HARDtalk
20.00 News – Weather
20.30 Click Online
21.00 News – Weather
21.30 World Business Report
22.00 News – Weather
22.30 World Review – Beyond 2000: »India«
23.00 News – Weather
23.30 World Business Report
23.45 Asia Today

TV3

05:00 Børne-hjørnet med Disney
06:35 Aladdin og de fyrretyve røvere
07:55 Knight Rider
08:50 Knight Rider
09:40 Hvide Løgne (G)
10:10 Horton-sagaen (G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 TV3 Biffen: Middag med mord
13:30 TV3 Biffen: Drøm med mig
15:35 TV3 Biffen: Far, mor og møgunge 2
17:10 Dagens Nyheder på TV3
17:30 Susan - sød og single
18:00 Alle tiders barnepige
18:30 Hvide Løgne
19:00 Torsdagsbio: Beethoven II
20:35 Heksene fra Warren Manor
21:30 Action
22:00 Dagens Nyheder på TV3
22:10 Drøm videre
22:40 Nash Bridges
23:30 Ti tommelfingre
00:00 Simpsons
00:25 Ellen
00:50 Sports Night
01:15 Ricki Lake
02:10 Godnat

ÚTVARP FØROYA

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur
07.15 Barnaløtan Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Morgunrásin
09.50 Morgunlestur (e)
10.00 Tíðindi
10.03 Fyrrapartsløg Kim Hansen stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.02 Dýrmæta lív (e) Jørgen Frantz-Jacobsen í glottaljósi úr brøvum hansara. 10. partur. William Heinesen tók saman. Christian Matras føroyskaði. Jógvan Arge og Sverri Egholm lesa.
11.30 Undir dagurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Endursending (e)
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin Sending við tónleiki og práti um sjómanslív. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Vangamynd Annlis Bjarkhamar og Jóhannes Miðskarð leggja til rættis
17.00 Tíðindini
17.05 Í Víngarðinum Símun J. Hansen leggur til rættis
18.05 Barnaløtan (e) Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Úr donskum bandasavni Skúlaútvarp í 1948. Hans Egholm leggur til rættis. Fyrra sending.
19.30 Harmonikutónleikur Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 Á sanganna veingjum Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur Ginna Midjord leggur til rættis
22.00 Rák Anita Ottosen stílar fyri
23.00 Tíðindi

Rás 2

10:45 Orðið Bibliulestur v/Anju Hansen
11:00 Tónleikur
12:00 Lýsingar
12:05 Tónleikur
13:00 The Outlaws (e) Um Willie Nelson. Laila Jacobsen leggur til rættis.
14:00 Simme er gestur (e) Sonni Smith leggur til rættis
15:00 Lýsingar
15:05 Aftur í 60-70'ini
17:00 Barnarásin (e)
18:00 Lýsingar
18:05 A-Z Pop
21:15 Orðið (e) Bibliulestur v/Anju Hansen
21:30 Lættur tónleikur
23:00 Góða nátt

Lindin

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikasending við verti
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð
20.55 Dagsins Orð
21.00 Bønarlinjan við gesti. Bønarevnu kunnu ringjast inn frá 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379
00.00 Vit gevast uml (uml)

Frívaktin

Hósdagin kl. 15.03

Í sendingini verður vitja m.a í Hvalba har teir hava haft fleiri størri og minni fiskifør, vitjað verður umborð einum av fiskibátunum. 89 ára gamli Klæmint Nicodemussen »Klæmint hjá Nielsi« á Sandi, heldur fram við frásøgnini um sítt lív sum sjómaður. Í sendingini greiðir Klæmint frá heysttúrinum undir Íslandi við deyðsiglaranum Corenett í 1929. Klæmint greiðir eisini frá fyrsta útróðrartúrinum við Tjaldrinum sum teir høddu latið bygt hetta sama árið árið.
Tað er Elis Poulsen sum leggur sendingina til rættis

Eitt óvanliga vanligt brúdleyp

– dokumentarsending frá BBC

Hóskvøldið kl. 20.20

Janeen og David Willis eru eitt heilt vanligt par. Tey hava búð saman í tíggju ár, men eru noydd at fara til Danmarkar fyri at giftast. Tí ensk lóg heimilar ikki hjúnaband millum eina brúður, ið er fødd, sum maður og ein brúðgóm, ið er føddur, sum ein kvinna.

Far, mor og møgunge 2

– Amerikanskur skemtifilmur frá 1991

Hósdagin kl. 15.35

Ben Healy og hansara illavorðni sonur Junior eru blakaðir út av heimbýi teirra og hava nú sett seg niður aðrastaðni.
Tað gongur tó ikki long tíð, fyrr enn tann óskikkiligi Junior aftur er til dystin fús at gera fortreð, og tað ber í sær at pissa í saftina og at spreingja dynamit á skúlanum.

Torsdagsbio: Beethoven II

– Amerikanskur familjuskemtifilmur frá 1993

Hóskvøldið kl. 19.00

Charles Grodin hevur aftur hesuferð leiklutin sum familjumaðurin George Newton, ið ger sítt besta. Hann hevur ímóti sínum vilja játtað at taka tann elskuliga men tó ómøguliga Skt. Bernhardshundin Beethoven inn í familjuna.
Beethoven gerst skotin í tí vøkru Missy, sum er av sama slagi, ið hann møtir ein dagin í parkini. Tað, sum eingin veit, er, at Missy er fangi hjá tí óndu Reginu, sum brúkar hundin til at fáa fyrrverandi mann hennara at geva henni fleiri pengar.
Tá Beethoven verður faðir at hvølpunum hjá Missy, er Regina frá sær sjálvari, og hon ætlar at drepa hvølparnar. So gerst tann ónda daman varug við, at hvølparnir kunnu seljast fyri nógvan pening...

ítróttur

Nr. 247 • fríggjadagur • 22. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Áki Olsen skeyt tólv mál mikukvøldið, og tað hevur so ikki gjørt liðið veikari, at stórskjúttin nú aftur er tøkur

Mynd: Álvur Haraldsen

VÍF-KÍF 25-16 (15-8)

Fult hús í Vestmanna

VÍF staðfesti oddastøðuna í seinasta dystinum í grundspælinum, og hava nú aftur fult stigatal, tá stigini verða hálvbýtt

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Seinasti dysturin í grundspælinum hjá monnum varð leiktur mikukvøldið, og ikki óvæntað varð tað VÍF, sum fór avstað við sigrinum, tá teir á heimavølli spældu móti KÍF.

Gjørdu bart

Dysturin var ikki gamal, so hevði VÍF longu sýnt gestunum, at her skuldu teir so ikki rokna við nøkrum sum helst.

Frá teirri løtu at Martin setti fyrsta bóltin í kassan, var VÍF omaná, og eftir at teir byrjaðu við at skjóta fimm mál á rað, var so at siga einki at spæla um.

Gaman í fingu kollfirðingar togað munin nakað niður miðskeiðis í hálvleikinum, men nærri enn trimum málum sluppu teir ongantíð.

Serliga var tað fyrstu løtuna, at VÍF sýndi, hví teir eru so langt fremst. Verjan riggaði sera væl, og millum annað vórðu fýra av fyrstu fimm málunum skotin eftir kvik kontraálop.

Bundu bara fyri

Í seinna hálvleiki vistu báðir partar, at her varð alt avgjørt, og tí gjørdist hesin ongan tíð nøkur stór hondbóltsuppliving.

Kollfirðingar royndu sum best at binda fyri, so talan ikki skuldi gerast um stórtap, og hetta eydnaðist so fyri ein part. Í øllum førum er 25 mál minsta tal, sum VÍF hevur skotið higartil í ár, og meira kann helst ikki krevjast av nøkrum liði í landinum, tá VÍF stendur hinumegin.

Áki við fullari ferð

Sum nevnt, so fer VÍF í endaspælið við fullum stigatali, og tað kann verða torført at síggja, hvussu nakað av hinum liðunum skal gera nakað við vestmenningarnar.

Ikki minst nú teir aftur hava Áka Olsen í hópinum. Fittan part av grundspælinum hevur hann verið úti við skaða, men seinasatu tveirtríggjar dystirnar hava vit aftur sað, hví hann verður roknaður sum kanska fremsti álopsleikari í landinum.

Tað sær ikki út av so nógvum, men skotini fara aloftast dundrandi í kassan uttan møguleika at verja fri, og fær hann, sum mikudagin, tólv kassar, so er liðið longu hálvgum ávegis einum sigri. At sjálvsálitið so eisini er, sum tað eigur at vera hjá einum stórskjútta, vitnaði seinasta málið eisini um.

VÍF fekk brotskast, tá tíðin var um at vera farin, og úr einum átta metrum skrúvaði Olsen-maðurin snildisliga í málið.

Tá var dysturin sjálvandi langt síðani avgjørdur, kollfirðingar høvdu fingið mann útvístan, og yvirhøvur tóktust teir bara at bíða eftir klokkuni.

Upp hóast tapið

Annars gjørdu kollfirðingar eitt lop á stigatalvuni, hóast teir taptu. Nú stigini verða hálvbýtt, hava teir saman við Tjaldri trý stig, men málmunurin hjá KÍF er væl betri enn hjá runavíkingum.

Tað er heldur ikki óhugsandi, at kollfirðingar megna at halda, og kanska betra um hesa støðu. Ikki minst nú teir hava fingið Iljan Topic afturat í hópin. Mikukvøldið gjørdi hann ikki tann stóra munin, men hann hevur longu prógvað, at hann kann gerast góður fongur.

Undir øllum umstøðum er líkt til, at várið fyri kollfirðingar fer at gerast meira spennandi enn hjá vestmenningum, men tað leggja tey Vestmanna helst einki í – bara teirra lið heldur á fram at vinna.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
VÍF: Áki Olsen 12(1), Sámal Joensen 3(1), Johnny Joensen 3, Martin Hummeland 3, Ingi Olsen 2, Agnar Joensen 1, Petur Fr. Joensen 1
KÍF: Durica Tomic 4, Regin Petersen 3, Petur Martin Poulsen 3, Jákup Dam 2, Iljan Topioc 2, Petur Martin Johansen 1, Vagnur Johannesen 1(1)
Brotskøst: VÍF 3, KÍF 2
Útvisingar: VÍF 3, KÍF 6
Diskvalifikatión: KÍF 1 (Beinleiðis reytt)
Dómarar úr Tjaldri: Dánjal Hansen og Kári Hansen.
Burtursæð frá einum einstøkum kontradómi vóru teir ivaleysir í dømingini. Sum heild ikki stórvegis at finnast at, og tað er at fegnast um, at teir aftur eru um at finna støði frá undanfarna kappingarári.

Innandura kappingar í Vági

Millum jól og nýggjár hava suðuroyingar møguleika at renna jólakiloini av sær, tá VB skipar fyri innandurakapping

INNANDURA
Jákup Mørk

Vikuskiftið millum jól og nýggjár skipar VB fyri stórari innandurakapping. Ella skuldi mann kanska sagt innadurakappingum.

Talan er nevnliga um tvær ymsar kappingar, sum verða avgreiddar hesar dagar.

Fríggjadagin, 29. desember, verður kapping hjá yngru liðunum upp til ávíkavist dreingja- og gentudeildina, meðan leygardagurin verður dagurin, tá tey eldru sleppa at royna seg. Hendan kappingin er ásett at verða firmakapping, har tað bert er loyvt liðunum at hava ein leikara, sum í kappingarárinum hevur spælt við fyrstu-, aðru- ella triðju deild.

Umframt sjálva kappingina, sleppa tey ungu eisini at stuttleika ssær, tí um kvøldið verður barnadiskotek í VB húsinum.

Ágóðin av báðum kappingunum fer til ungdómsarbeiðið hjá VB, verður at enda sagt í tíðindaskrivinum.

Støðan 1. deild kvinnur

		dystir	v	- j	- t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	11	10	- 1	-0	334	181	153	21
2	Stjørnan	11	9	- 1	- 1	309	234	75	19
3	VB	8	5	- 0	- 3	220	174	46	10
4	Kyndil	11	5	- 0	- 6	253	293	-40	10
5	Neistin	10	4	- 0	- 6	209	227	-18	8
6	Sóljan	11	1	- 1	- 9	207	290	-83	3
7	Tjaldur	10	0	- 1	- 9	158	291	-133	1

Støðan 1. deild menn

		dystir	v	- j	- t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	12	11	- 1	- 0	394	284	110	23
2	StÍF	12	7	- 1	- 4	355	313	42	15
3	Kyndil	12	6	- 3	- 3	337	303	34	15
4	Neistin	12	6	- 0	- 6	287	303	-16	12
5	H71	12	4	- 0	- 8	313	340	-27	8
6	Tjaldur	12	3	- 0	- 9	276	365	-89	6
7	KÍF	12	2	- 1	- 9	263	317	-54	5

Máltindurin

Halgir D. Olesen	H71	103	(13)
Bjarni Wardum	Kyndil	87	(17)
Ingi Olsen	VÍF	86	(20)
Artur Johansen	StÍF	76	(22)
Dorica Tomic	KÍF	71	(22)
Sverri Justinussen	Tjaldur	69	(8)
Jónleif Sólsker	Kyndil	65	(22)
Sámal Joensen	VÍF	63	(3)
Áki Olsen	VÍF	59	(4)
Martin Hummeland	VÍF	58	
Costin Dumitrescu	StÍF	57	(14)
Jacob Jónsson	Neistin	52	(6)
Mortan Hansen	Tjaldur	46	(3)
Jens Martin Knudsen	Tjaldur	46	(10)
Marius Joensen	StÍF	45	(1)